## Nýggj nevnd í B71

Bara eitt mál var á skránni, tá ið B71 leygardagin hevði eykaaðalfund. Málið snúði seg um val av nýggjari starvsnevnd. Í gomlu nevndini vóru tríggir limir. Í nevndini, sum varð vald á fundinum leygardagin, eru seks limir. Einasti nevndarlimurin, sum var í gomlu nevndini, og sum eisini er í nýggju nevndini, er Ragnar Fossdalsá, sum var formaður í gomlu nevndini. Eli Henze, sum verður venjari hjá Formulaliðnum hjá B71 næsta ár, og Magnus Olsen, sum er partur av Formulaliðnum hjá B71, fóru á fundinum leygardagin úr nevndini. Í nýggju nevndini eru seks limir: Ragnar Fossdalsá, Jonhard Johannesen, Brandur Sandoy, Ingimar Tór Thomsen, Sofus Lognberg og Jens Petersen.



## Benitez úr vandasjógvi

Seinastu vikurnar hevur verið skrivað nógv um, at nýggju eigararnir av Liverpool vildu hava Rafael Benitez úr venjarasessinum. Ikki minst eftir at Benitez segði seg hava tørv á nógv meira peningi enn tað, sum eigararnir vildu geva, nú transfer-vindeygað skjótt letur upp. Sunnudagin var fundur á skránni millum Tom Hicks, George Gillet, Rick Parry og Rafael Benitez, men hesin gekk fyri seg uttan dramatikk av nøkrum slag. – Talan var um sera positivan fund, og vilja allir partar gera sítt ítarsta, felagnum at frama, verður soleiðis skrivað á heimasíðuni hjá Liverpool.

VÍF-Neistin 34-29 (14-14):

# VÍF heldur í vónini

**Neistin megnaði ikki at slíta seg púrasta leyst av VÍF, og saman við H71 elta vestmenningar framvegis finalumøguleikanum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fyrr í heyst megnaði Neistin at fáa javnleik í at síggja til vónleysari støðu í Vestmanna. Men tann møguleikan fingu teir ikki aftur hesaferð*

*savnsmynd*

Sammett við dystin móti StÍF fyri viku síðani, var tað sum dagur og nátt í Vestmanna. Ta ferðina megnaðu teir gulu neyvan at seta fótin rætt fyrstu longu løtuna av dystinum, og í øllum førum kann staðfestast, at teir høvdu tikið læruna við sær til dystin leygardagin.

Tí Neistin fekk snøgt sagt ikki fótin fyri seg fyrstu longu løtuna. VÍF trumlaði avstað, og eftir bara 20 minuttum tóktist dysturin mest sum avgjørdur. Ikki minst tí Neistin hevði misnýtt heili 5 brotskøst á vegnum. Neistin hevur tó fleiri ferðir fyrr í ár sýnt framúr stríðsvilja, og við seks málum á rað seinastu løtuna undan steðginum togaðu teir seg upp á javnt.

Tí var spenningurin veruliga komin í aftur, tá seinni hálvleikur byrjaði, og sálarliga var Neistin nú kanska omaná. Men teir megnaðu ikki at gera sær dælt av hesum. Ístaðin byrjaði VÍF aftur at økja um leiðsluna, og tó at hendan ikki gjørdist eins sannførandi, sum hon hevði verið tað fyri steðgin, so fekk Neistin ikki loyvi at skapa sama veruliga spenning, sum endaspurturin fyri steðgin legði upp til.

### Spenningur um finaluplássið

Við sigrinum syrgdu vestmenningar fyri, at teir enn hava eina grundaða vón um at røkka finaluplássinum í FM-kappingini, men tað krevur, at avrikið javnt og samst verður á sama støði, sum tað var tað leygardagin.

Til tíðir hevur liðið prógvað seg sum kanska mest seriøsi avbjóðarin hjá StÍF, men við unga spælarahópinum og vantandi royndunum hava avrikini sveiggjað millum tað framúr góða og tað heilt ússaliga. Hesa ferð var avrikið nærri toppinum, og megnar liðið at lyfta botnstøðið nakað, so teir sleppa undan keðiligum blackout's seinasta partin av kappingini, so er væl hugsandi, at teir kunnu bíta seg heilt fastar. Og í so máta gerst tað ikki verri, nú Daniel Rapa aftur er á liðnum.

Hjá Neistanum er enn luft niður til næstu liðini, men tað skerst ikki burtur, at avrikið skal lyftast nakað, um finaluplássið skal tryggjast. Eftir eina framúr byrjan hava avrikini seinastu vikurnar sveiggjað meira enn ráðiligt er.Nú hevur liðið tó – eins og hini – ein mánað til at fínpussa formin, áðrenn tað av álvara verður farið undir endaspurtin í kappingini.

## FAKTA

**VÍF-Neistin 34-29 (14-14)**
10 min: 6-4
20 min: 12-6
40 min: 20-19
50 min: 25-22
**Málskjúttar**
**VÍF:** Rúni Joensen 8, Agnar Joensen 8(1), Áki Olsen 6(1), Niels Andreasen 3, Jákup Suni Andreasen 3, Sjúrður Poulsen 3, Danielsen Rapa 2, Regin Joensen 1
**Neistin:** Karl Herup Olsen 7, Áki Mørk 7(3), Dann Thorleifsson 4, Jugoslav Djumic 4, Blagoje Buha 2, Roar Dalsgarð 2, Tróndur Kragesteen 2(1), Jón Ludvík 1
**Brotskøst:** VÍF 2, Neistin 12
**Útvísingar:** VÍF 6, Neistin 3
**Diskvalifikatión:** Neistin 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg

VÍF-Neistin 23-30 (9-13):

## Neistin helt fast

**Neistakvinnurnar vunnu tryggan sigur, tá vitjaðu í Vestmanna leygardagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað tók sína tíð, áðrenn Neistin veruliga kom í snúningar í dystinum móti VÍF leygardagin. Bláu kvinnurnar høvdu stórar trupulleikar í Vestmanna fyrr í heyst, og fyrstu 20 minuttirnar ella sær neyðugu leiðsluna.

Og hana høvdu tær als ongan hug at missa, tá farið varð undir seinna hálvleik. At tær á heimaliðnum eisini tóktust hava mist mótið hesa løtuna, gav Neistanum heilt lætt spæl eina løtu, og hetta høvið nýttu tær til at beina allan iva um úrslitið burtur.

Við sigrinum helt Neistin fast um støðuna á stigatalvuni, har tær í løtuni eru besta boðið til finalumótstøðu hjá Stjørnuni. Hjá VÍF er støðan nakað meira sperd. Liðið er nú á aftastas



*Neistakvinnurnar halda enn kósini, sum tykist vera sett beint móti FM-finaluni*

*savnsmynd*

so høvdu hesir hug at endurtaka seg sjálvar.

Ein løtu sveik konsentratiónin hjá heimaliðnum tó, og so vóru tær bláu skjótar at revsa við kviku kontra-álopunum, sum eru vørumerkið hjá liðnum. Seinastu løtnua av fyrra hálvleiki vann Neistin ikki minni enn 5-1, og so høvdu tær vunnið sessinum í Sunset-kappingini, og tó at nógvir dystir enn eru eftir at spæla, so skerst ikki burtur, at støðan er trupul. StÍF og Kyndil hava her ein fyrimun upp á tvey stig, og tí verður helst neyðugt við seks av átta stigum í botnuppgerðunum, um VÍF eisini skal spæla í Sunset-kappingini komandi kappingarár.

## FAKTA

**Neistin-VÍF 23-30 (9-13)**
10 min: 2-3
20 min: 6-8
40 min: 13-19
50 min: 16-27
**Málskjúttar**
**VÍF:** Ioana Rapa 10, Heidi Joensen 5, Fríða Marjunardóttir 3, Liljan Djurhuus 3, Trogunn Herlufsdóttir 2
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 14(1), Ása á Neystabø 5, Unn J. Kragesteen 5, Elin Stakksund 3, Anja Heinadóttir 1, Helena á Krákusteini 1, Rakul Augustinussen 1
**Brotskøst:** VÍF 1, Neistin 2
**Útvísingar:** VÍF 5, Neistin 3
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg